# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2015

| **Fundur nr. 2**<br>**Tíð:** 23. februar 2015 kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | | **Skrivari:** Petry Joensen |
|---|---|---|
| **Fastir fundardagar:**<br>26. januar, 23. februar, 30. mars,<br>27. apríl, 01. juni, 29. juni<br>24. august, 28. september,<br>26. oktober, 30. november,<br>14. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir | **Ikki á Fundi:** |

**1) Mál nr.: 15/00055 Bjargingarbátur til Suðuroyar Sunnara Sløkkilið**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá Fíggjarnevndini sum á fundi 19. februar 2015 hevur samtykt at taka undir við at útvega sløkkiliðinum/bjargingarliðinum í Sunnaru helvt ein bjargingarbát. Ein bátur er í boðið fyri áleið 200.000,00 kr. Og verður parturin hjá Vágs kommunu áleið 132.797,00 kr..
Eingin játtan er til hetta á FÆ2015 og tí má ein eykajáttan til.

**Avgerð:**
Gudmund Jacobsen var inni á fundinum og greiddi frá hvussu skipanin er broytt síðan nýggj lóg kom í gildið, og hvussu væl útgjørt sløkkiliðið í Sunnari helvt er, í mun til galdandi krøv.

Einmælt samtykt at taka undir við at keypa bátin og veita eykajáttan til íløguna.
Eykajáttanin skal hava tvinnar viðgerðir.

**2) Mál nr.: 15/00017 Leigumál við P/F Baglhólm**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá Havnanevndini sum á fundi 9. februar hevur mælt til at ganga umbønini frá P/F Baglhómi á møti. Felagið søkir um at leiga undirlendi matr.nr. 170a frá Vágs kommunu, har ætlanin er at byggja eina goymslu- og arbeiðshøll. Fíggjarnevndin samtykti einmælt á fundi 19. februar at taka undir við havnanevndini og leggja málið fyri býráðið.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 15/00044 Vinarbýarvitjan í juni 2015**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til umrøðu fyrispurning frá Sangerðisbær, sum ynskir at koma á vitjan í Vági í summar 2015.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at Vágs Býráð sær fram til at taka ímóti teimun í summar, um tey ynskja at koma á vitjan.

**4) Mál nr.: 15/00063 Uppskot til hoyringar um skúladeplar**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til umrøðu uppskot sent Føroyra Kommunufelag til hoyringar viðv. Uppskot til løgtingslóg um skúladeplar (Depilslógin)

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við at kommununar í Suðuroynni saman við leiðsluni á Skúladeplinum í Hovi gera eitt uppskot til svarskriv saman.

Undirskriva: